## Bátur ásigldur á Norðhavinum

Ein 82 ára gamal maður umborð á bátinum, Góðifossur, varð ásigldur á Norðhavinum. Tað var í fyrradagin báturin varð ásigldur. Báturin fekk eitt vet av skaða, men sum skilst var ongin mannsskaði. Tá skaðin var hendur varð báturin fylgdur av Brimli inn á Strendur, har báturin nú er tikin upp. Eigarin av ásilgda bátinum váttar hendingina, men vil ikki gera viðmerkingar til málið.



## Kreppan skerjir útlátið

ES fær neyvan nakrar trupulleikar við at røkka málinum um at skerja sítt $CO_2$-útlát 20 prosent hetta til 2020. Danska blaðið Information skrivar, at ES-londini sleppa kanska frá at fremja fleiri tiltøk á veðurlagsøkinum, tí búsksparkreppan, atgongdin til $CO_2$-kvotur frá øðrum londum og rætturin til at flyta óbrúktar kvotur gera, at samveldið kann røkka tí setta málinum uttan fleiri tiltøk. Men tað kann eisini vera óheppið, tí úrslitið kann blíva, at allar ætlanir um grøna menning gerast óneyðugar og fara fyri bakka, skrivar blaðið.

# Kærugongdin í stuttum

Sum kunnugt hava partar av skúlastýrinum í Kommunuskúlanum kært býráðið viðvíkjandi samtyktini um at savna 10. flokk í Eystur-skúlanum.

Fyri jól varð kært til Innlendismálaráðið vísandi til, at talan var um kommunalt eftirlitsmál. Vegna ógegni í Innlendismálaráðnum fekk Almannamálaráðið málið at viðgera, og vísti Almannamálaráðið kæruni aftur í tveimum umførum vísandi til, at talan er ikki um kommunalt eftirlitsmál, men um undirvísingarmál, har Mentamálaráðið sbrt. fólkaskúlalógini er kærumyndugleiki.

Partar av skúlastýrinum hava síðani kært málið víðari til Mentamálaráðið. Tað málið fekk Fiskimálaráðið at viðgera vegna ógegni í Mentamálaráðnum.

Í báðum førum hevur kærarin biðið um steðgandi virknað, meðan sjálv kæran verður viðgjørd. Fríggjadagin tók Fiskimálaráðið avgerð um at steðgandi virknað. Kommunan steðgaði samsvarandi sínum fyrireikingum.

### Kæran í stuttum

Í stuttum er kært um, at eitt kommunustýrið hevur sbrt. § 47, stk. 6 og § 52, stk. 4 í fólkaskúlalógini ikki heimild til einsamalt at seta í verk broyting í skúlabygnaðinum í einum skúla, tí at tað sbrt. hesi áseting er skúlastýrið í viðkomandi skúla, ið skal koma við slíkum uppskoti. Eftir hesum er myndugleikin hjá kommunustýrinum avmarkaður til at góðkenna uppskotið hjá tí einstaka skúlastýrinum.

Kærarin vísir í hesum sambandi á, at skúlastýrið í Kommunuskúlanum ongantíð hevur gjørt nakað uppskot um at flyta alla undirvísing av 10. flokki í Eysturskúlan. Harumframt verður víst á, at samtyktin, sum býráðið legði fyri Mentamálaráðið, og sum bygdi á felags tilmæli frá øllum skúlastýrinum um 10. flokk, er ikki tað, sum Mentamálaráðið eftirfylgjandi góðkendi.

Sbrt. kæruni hevur eitt kommunustýrið bert heimild at góðkenna uppskot, sum eru komin frá skúlastýrinum. Kommunustýrið hevur eftir hesum hvørki sjálvstøðugan initiativrætt ella avgerðarrætt viðvíkjandi skúlabygnaðinum – bert góðkenningarrætt.

Í lógarviðmerkingunum til omanfyri nevndu § 52, stk. 4 verður beinleiðis víst til kommunur, har fleiri skúlastýri eru.

Sitat: Sbrt. § 47, 6. stk. er tað kommunustýrið, ið skal góðkenna uppskotið um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum. Tað er tí ikki óhugsandi, at kommunustýrið ásetir nakrar meginreglur viðvíkjandi skúlabygnaði kommununnar og tá serstakliga í føri, har fleiri skúlastýri eru í kommununi, og at uppskot skúlastýrisins so mega laga seg til hesar meginreglur.

Tað er hesa heimild, ið býráðið hevur brúkt. Hetta merkir, at kommunustýrið kann gera broytingar í uppskotinum frá einum skúlastýri. Hetta merkir eisini, at kommunustýrið sjálvt kann taka inititiv til broytingar, sum fevna um skúlabygnaðinum í allari kommununi.

-leo

Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri.

Øll 11 skúlastýrini tóku upprunaliga undir við ætlanini í 2008, tá ið býráðið samtykti ætlanina.

Síðani hava leiðslan og partar av skúlastýrinum fyri Kommunuskúlan arbeitt ímóti og hava millum annað sent eina kæru inn móti býráðssamtykt, har sagt verður, at bygnaðarbroytingarnar eru ásettar í heimildarloysi, sigur Jóan Petur Hentze.

Men kæran er farin ígjøgnum eitt óvanligt sirkus, og er send frá Pontius til Pilatus, og er soleiðis endað í Fiskimálaráðnum av øllum instansum.

### Frá Pontius til Pilatus

Upprunaliga varð kæran send til Innlendismálaráðið, ið hevur eftirlit við kommununum, men av tí at Annika Olsen er so nær skyld einum av limunum í skúlaráðnum fyri Kommunuskúlan, varð kæran send víðari til Løgmann at taka støðu til vegna ógegni.

Løgmaður gjørdi síðani av, at senda kæruna víðari til Almannaráðið. Almannamálaráðið vísti kæruni aftur, tí mett var ikki, at talan var um kommunalt eftirlitsmál.

Kært varð síðan til Mentamálaráðið, ið er kærumyndugleiki sambært fólkaskúlalógini. Eisini Mentamálaráðið beindi málið víðari til løgmann eisini vegna ógegni, og at Mentamálaráðið var partur av málinum, tí ráðið hevði góðkent nýggja skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu. Eisini hevði ráðið sýtt einari umsókn um 10. flokk frá Kommunuskúlanum – sum væl at merkja var send uttan um og uttan vitan av Tórshavnar býráð, ið av røttum skuldi góðkent umsóknini.

Nú er kæran so enn einaferð umvegis løgmann endað í Fiskimálaráðnum. Partur av kæruni hjá skúlastýrinum snýr seg um steðgandi virkni, meðan kæran verður viðgjørd, og í tí punktinum hevur Fiskimálaráðið so givið kærandi skúlastýrinum viðhald.

Hetta gevur tó ikki Kommunuskúlanum rætt til av sínum eintingum at skipa 10. flokstilboð, og tí hevur býráðið nú umvegis sakførara sín heitt á fútan um at seta fram fútaforboð móti Kommunuskúlanum.

### Ógegni

Nærum allan vegin gjøgnum mylluna hevur verið talan um ógegni. Hetta gjørdi seg galdandi í Innlendismálaráðnum, og var eisini ein partur av málinum í Fiskimálaráðnum, har ein leiðandi embætismaður er pápabeiggi til ein av lærarunum og 10. floks forsprákarunum í Kommunuskúlanum.

Støða er kortini tikin til, at lógin um gegnið ikki er galdandi í tí førinum.

Tað stutta av tí langa er kortini, at málið í løtuni liggur hjá Fiskimálaráðnum, og tá niðurstøðan í fyrsta umfari er, at virknið av bygnaðarbroytingini skal steðgast, meðan kæran verður viðgjørd, hevur hetta ført við sær, at býráðið vil hava sett fútaforboð móti Kommunuskúlanum og ætlanum skúlans óheimilað at innskriva næmingar til 10. flokk skúlaárið 2010/2011.

- Tað er sjálvandi ógvuliga harmiligt, at neyðugt er at taka eitt slíkt stig, men skúlaleiðslan er farin langt út um sínar heimildir, , sigur Jóan Petur Hentze.

Eisini borgarstjórin, Heðin Mortensen, harmast um, at málið skal verða komið hartil, at neyðugt er við einum fútaforboði.

- Upprunaliga ætlanin var at seta nýggja skúlabygnaðin í verk skúlaárið 2009/2010, men avgjørt var at útseta hetta til komandi skúlaár. Hetta var gjørt, so at Kommunuskúlin skuldi fáa tíð og umstøður at tillaga seg til nýggja skúlabygnaðin. Tað, sum vit síðani hava sæð er, at leiðslan í skúlanum púra í sjálvdrátti hevur arbeitt við ætlanum um at halda fram við 10. floks virkseminum, og tí var neyðugt at taka hetta óhoyrda og sera drastiska stigið, sigur Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen leggur aftrat, at 10. flokkur næsta skúlaár undir øllum umstøðum verður í Eysturskúlanum, og hann harmast um, at næmingar og foreldur nú eru ørkymlað um støðuna.

- Vit fara tó at tryggja, at allir næmingar, ið ætla sær í 10. flokk, verða tiknir inn, hóast at umsóknarfreistin er farin, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

# Kommunuskúlin undrast á framferð

Hanus Joensen, skúlastjóri í Tórshavnar kommunuskúla, sigur seg onga viðmerking hava til málið, men undrast stórliga yvir, at miðlarnir hava fingið fatur á einum uppskoti til fútabann, áðrenn hann hevur hoyrt nakað.

– Eg má síggja sjálvt skjalið, áðrenn eg geri nakra viðmerking, men eg haldi tað vera løgið, at vit ikki hava fingið hatta skjalið, sigur Hanus Joensen.

### Nýggjur vinkul

Skúlastjórin í kommunuskúlanum sigur somuleiðis, at hetta ljóðar sum, at málið fær eina heilt nýggja vend.

– Hetta ljóðar sum ein heilt nýggjur vinkul í málinum. Men tað eru væl heilt greiðar reglur fyri fútaforboð.

– Eg kenni onki til jura, men eg havi ongantíð hoyrt um fútaforboð í einum slíkum máli, sigur Hanus Joensen.

Spurdur, hvør næsti leikur hjá kommunuskúlanum verður, sigur skúlastjórin seg ikki hava nakra viðmerking.

– Eg má fyrst síggja sjálvt skjalið, áðrenn nakað annað verður, staðfestir Hanus Joensen.

-eij



*Hanus Joensen, skúlastjóri í kommunuskúlanum, dugir ikki at siga, hvør næsti leikur skúlans verð*